# Føroya Arbeiðsgevarafelag

# Ársfrágreiðing 2006

Ein lýsing av samfelagsgongdini, gongdini innan vinnuna og virkseminum hjá felagnum

VINNUHÚSIÐ
House of Industry

# Inngangur

Henda ársfrágreiðing varð løgd fram á aðalfundinum hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag (FAG) 15. juni 2007.

Endamálið við frágreiðingini er at geva limum okkara og øðrum áhugaðum eina stutta lýsing av gongdini í samfelagnum, virksemi okkara og teimum tænastum, felagið veitir.

## Arbeiðsgevarafelagið 2006

Føroyar hava nú aftur í góð tvey ár verið á einum búskaparligum alduryggi, eftir ein minni stíg í búskapinum. Samanumtikið hevur vøkstur verið í føroyska búskapinum líka síðan kreppuna mitt í 90'unum, og framgongdin í 2006 hevur verið nøktandi.

Hóast gongdin higartil hevur verið positiv, so boða útmeldingar frá fiskifrøðingum frá, at serliga fiskiveiðan eftir toski, kann minka munandi.

Hetta er tó ikki størsta hóttanin fyri samfelag okkara beint nú. Størsta hóttanin fyri framhaldandi vælferð okkara er trotið av arbeiðsmegi. Tað eru ikki bert fiskavirkini ella handverksvinnan, sum mangla fólk. Hesin trupulleikin hevur nú spreitt seg út á fleiri vinnur og út um alt landið.

Í dag er beinleiðis trot á arbeiðsmegi. Uttan arbeiðsmegi ber ikki til at skapa virðir í samfelagnum, og tí er alneyðugt, at føroyski arbeiðsmarknaðurin verður latin upp fyri fremmandari arbeiðsmegi.

Politikarar skulu taka hetta í størsta álvara, tí vit fáa ikki skapt neyðugu virðini, og vit dragna í mun til onnur samfeløg. Trupulleikin fer eisini at elva til lønarglíðing, sum endar við inflatión. Búskaparliga er trotið á arbeiðsmegi stórsta einstaka hóttanin fyri Føroyar, og tí hevur ein loysn skund.

Arbeiðsgevarafelagið frøist um, at tað við samráðingunum í 2007 eydnaðist at fáa sáttmálar á einum nøktandi støði, og at vit nú hava frið á arbeiðsmarknaðinum í trý ár.

Nógvu virkissølurnar hava hildið fram seinasta árið, og sum vit staðfestu í fjør skapar hetta økt virkisfýsni og dynamikk í vinnuni. Væntandi fer dynamikkurin at koma í hæddina, tá ið stóru føroysku fyritøkurnar fara at vera einskildar. Tí kann roknast við, at búskapurin fer at fáa meira ferð á enn vit síggja í dag, og vit kunnu økja um livistøðið í samfelagnum, um rætt verður borið at.

Eitt veruligt hóttafall í fiskiveiðini kann tó ávirka búskapargongdina sera álvarsliga.

Føroya Arbeiðsgevarafelag og Vinnuhúsið umboða **664** virkir, sum eru limir í feløgunum í húsinum. Av hesum eru **549** limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Arbeiðsgevarafelagið er rødd vinnunnar, bæði mótvegis myndugleikum, politikarum, fakfeløgum, fjølmiðlum og samfelagnum sum heild. FAG hevur áhaldandi samskifti við myndugleikar og politikarar fyri at fáa broytingar í løgum og reglum lagaðar til veruleikan hjá vinnuni.

*Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag,*

*Jóhan Páll Joensen, formaður*

# Innihaldsyvirlit

**INNGANGUR** ..... 1

**INNGANGUR** ..... 2

ARBEIÐSGEVARAFELAGIÐ 2006 ..... 2

**BÚSKAPURIN - GONGDIN Í 2006 OG ÚTLITINI** ..... 4

LØNARÚTGJALDINGAR ..... 4
PRÍSTALIÐ OG LØNARVØKSTUR ..... 5
ARBEIÐSLOYSIÐ OG STØÐAN VIÐVÍKJANDI ARBEIÐSMEGI ..... 7
FISKIVINNAN ..... 8
FISKAVIRKINI ..... 9
ALIVINNAN ..... 9
UTTANLANDSHANDILIN ..... 10
TAÐ ALMENNA ..... 11
NIÐURSTØÐA UM BÚSKAPARGONGDINA ..... 12

**GONGDIN INNAN EINSTØKU VINNUGREINARNAR** ..... 13

FISKI- OG FLAKAVINNAN ..... 13
FISKAVIRKINI ..... 13
*Rávørutilgongdin til vinnuna* ..... *14*
ALIVINNAN ..... 15
*Framleiðsla* ..... *16*
*Útflutningur* ..... *16*
HANDVERKSVINNAN ..... 17
OLJA OG FRÁLANDAVINNA ..... 18
KT-VINNAN ..... 18
HANDIL OG PRIVATAR TÆNASTUR ..... 18

**STRATEGIBÓLKURIN HJÁ FAG** ..... 20

FRÁGREIÐING UM ARBEIÐSMARKNAÐIN ..... 20
VÍÐSJÓN 2015 VAR EIN VEKINGARRØRSLA ..... 21

**BÓKLINGUR UM SAMSPÆLIÐ MILLUM NEVND OG STJÓRN** ..... 21

**SÁTTMÁLAVIÐURSKIFTI OG FØROYSKI ARBEIÐSMARKNAÐURIN** ..... 22

SÁTTMÁLASAMRÁÐINGAR Í 2007 ..... 22
*Sáttmálasamráðingarnar við arbeiðarafeløgini* ..... *22*
*Protokollat um rúmliga arbeiðsmarknaðin* ..... *23*
GJÓGVIN ER EIN MYTA ..... 23
*Samráðingar um sáttmála fyri skrivstovu- og krambafólk* ..... *24*
*Sáttmálasamráðingar fyri framman* ..... *25*
*Sáttmálasamráðingar hjá øðrum feløgum* ..... *25*
ÚTLENDSK FAKFELØG Í FØROYUM ..... 25
ARBEIÐI VIÐ NÝGGJARI SEMINGSLÓG ..... 26
VEGLEIÐING UM SETUNARVIÐURSKIFTIR Á WWW.INDUSTRY.FO ..... 26

**VINNUNÁM** ..... 27

**TILTØK 2006/07** ..... 27

*Vinnudagurin 2006* ..... *27*
*KT 2006* ..... *28*
*Offshore Faroes 2007* ..... *28*

**FELØGINI Í VINNUHÚSINUM OG TEIRRA UPPGÁVUR** ..... 29

**KELDUR** ..... 31

Partur

1

# Stutt um samfelagsgongdina og gongdina innan vinnuna

## Búskapurin - gongdin í 2006 og útlitini

Við undantakið av einum minni stígið í búskapinum árðini 2002 til fyrru helvt av 2005, hevur vøkstur verið í føroyska búskapinum líka síðan kreppuna mitt í 90'unum, og framgongdin í 2006 hevur verið nøktandi.

Vit merkja tó í løtuni álvarsamar trupulleikar, sum eru ein hóttan móti áhaldandi búskaparvøkstri. Seinasta árið hevur stórur mangul verið á arbeiðsmegi. Hetta er ikki longur nakað sum bert rakar einstakar vinnur ella ávísar partar av landinum. Manglandi arbeiðsmegi er ein trupulleiki fyri flest allar vinnugreinar, og hetta rakar breitt um landið.

Bæði Búskaparráðið og Landsbankin hava í frágreiðingum staðfest, at tørvurin á arbeiðsmegi ikki verður nøktaður, og at hetta er ein bygnaðartrupulleiki, sum fer at tálma búskaparvøksturin í 2007. Føroya Arbeiðsgevarafelag staðfestir, at henda hóttan móti framburði í samfelagið okkara eigur og skal fáast av vegnum sum skjótast, ella hevur politiska skipan okkara ikki tikið sína ábyrgd í álvara.

### Lønarútgjaldingar

Ferð er aftur komin á búskapin. Bruttotjóðarúrtøkan vaks við 10,4% í fjør, og er tað ein stórur vøkstur í mun til undanfarin ár, har stíður hevur verið í vøkstrinum. Árini frá 2002 til 2005 vóru merkt av stíði í búskapinum.

Greitt tekin um framgongd er, at lønargjaldingarnar fyrsta ársfjórðing í fjør vuksu 8%, og fyrsta ársfjóðring í ár er framgongdin 10% í mun til undanfarna ár.

Myndin niðanfyri vísir eisini at vøkstur er í øllum greinum, bæði innan privata tænastu, framleiðslu og tilfeingisvinnu.

Størsti vøksturin er í tilfeingisvinnuni, har eitt nú uppisjóarvinnan gongur væl, og har alivinnan er við at koma fyri seg aftur. Eisini er stórur vøkstur í tænastuvinnuni, serliga innan vinnuligar tænastur og flutning.




▪ Mynd 1: Lønargjaldingar 1. ársfjóðring




▪ Mynd 2: Lønargjaldingar býttar á vinnugeirar 1. ársfjóðring

## Prístalið og lønarvøkstur

Mynd 3 vísur gongdina í brúkaraprístalinum frá 1. ársfjórðingi 2001, tá tað var sett til 100, til 1. ársfjórðing 2007.




- Mynd 3: Prístalið

Prístalið fór at hækka fyrst í 2004 og hækkaði javnt árini fram til 2006.

Í meðal hevur árligi prísvøksturin tó bert verið gott 1% síðani 2001, tó nakað hægri – umleið 1,7% - seinastu 3 árini. Samstundis hava lønarhækkingarnar verið stórar. Hetta hevur sostatt viðført ein stóran reallønarvøkstur.

Um hugt verður at einum handverkara er lønarkostnaðurin av einum handverkaratíma hækkaður úr 112,11 krónum hin 1. oktober 2000 til 142,12 krónur hin 1. januar 2007. Um hugt verður eftir einum arbeiðara, er lønarkonstnaðurin hækkaður úr 99,19 krónum í 2000 til 124,62 krónur í 2006. Verður lønarkostnaðurin gjørdur um til indeks og samanborin við prísvøksturin, so hevur reallønarvøksturin verið umleið 20 prosent.




▪ Mynd 4: Lønar- og prísvøkstur

## Arbeiðsloysið og støðan viðvíkjandi arbeiðsmegi

Arbeiðsloysið í Føroyum hevur í fleiri ár verið sera lágt. Alt árið 2002 og stóran part av 2003 var arbeiðsloysið niður móti 2%. Í flestu av grannalondum okkara kemur arbeiðsloysið ongantíð niður um 4%.

Í 2004 og 2005 vaks arbeiðsloysið nakað, sjálvt um tað alt hetta tíðarskeiðið[1] hevur ligið undir 4%. Í 2006 fór arbeiðsloysið aftur at lækka, og tað er fyrstu mánaðarnar í 2007 søguliga lágt, á leið 1,6%.

[1] Undantikið í einum einstøkum mánaða í 2005




- Mynd 5: Arbeiðsloysið

Seinnu árini hava nógv virkir havt trupult við at fáa fólk. Serliga fiskavirkini hava í tíðarskeiðum havt trupult at fáa fólk, og handverksvinnan er ein av vinnugreinunum, sum hevur stórar trupulleikar við at fáa arbeiðsmegi. Hesin trupulleikin hevur nú spreitt seg út á fleiri vinnur og er so við og við vorðin størsta forðingin fyri búskaparvøkstri í Føroyum.

Í dag er beinleiðis trot á arbeiðsmegi. Uttan arbeiðsmegi ber ikki til at skapa virðir í samfelagnum, og tí er absolutt neyðugt, at føroyski arbeiðsmarknaðurin verður latin upp fyri fremmandari arbeiðsmegi.

Politikarar skulu taka hetta í størsta álvara, tí vit fáa ikki skapt neyðugu virðini, til at ætlanin um, at vit skulu vera líka rík sum onnur samfeløg, skal bera á mál. Trupulleikin fer eisini at elva til lønarglíðing, sum endar við inflatión. Búskaparliga er trotið á arbeiðsmegi stórsta einstaka hóttanin fyri Føroyar.

Nógv hevur verið tosað um loysnir seinasta árið, men enn er ikki komið á mál, og enn er talan um einvegis ferðslu út úr landinum. Føroya Arbeiðsgevarafelag fer tí enn einaferð at heita á politiska myndugleikan um at finna eina loysn, tí hetta hevur skund.

## Fiskivinnan

Um hugt verður eftir fiskiskapinum undir Føroyum seinasta árið kann staðfestast, at feskfiskaveiðan lækkaði eitt vet í 2006 í mun til 2005. Nøgdin var á góð 134.000 tons. Virðið á feskfiskaveiðuni er tó økt nakað í 2006 í mun til 2005. Sjálvt um nøgdirnar av hýsu og upsa eru nakað minni í 2006 enn í 2005, er virðið á hesum fiskasløgum økt.

Minking er í toskafiskiskapinum fjóðra árið á rað. Fiskiskapurin eftir toski er minkaður úr umleið 25.000 tonsum í 2004 til smá 19.000 tons í 2005, og í 2006 eru fiskað 13.600 tons av toski. Í 2005 fiskaðu lemmatrolarar á Íslandsrygginum, meðan tað í 2006 ikki varð fiskað nógv har. Fiskiskapurin eftir hýsu er somuleiðis minkaður triðja árið á rað, og er veiðan í 2006 góð 16.000 tons.

Veiðan eftir øðrum fiskasløgum er økt nakað væl í 2006 í mun til 2005. Hetta er fyrst og fremst veiðan eftir gulllaksi, sum øktist frá knøppum 7.000 tonsum í 2005 til góð 12.000 tons í 2006.

Seinastu regluligu yvirlitstrolingarnar hjá fiskirannsóknarskipinum Magnusi Heinasyni, sum verða gjørdar fyri at fáa til vega tilfar til stovnsmetingarnar vísa, at útlitini fyri tosk eru vánalig. Hýsan og upsin eru heldur frægari fyri enn toskurin. Endaliga niðurstøðan um stovnarnar og tilráðingar til komandi fiskiár eru ikki gjørdar enn, og minnast skal til at yvirlitstrolingarnar er bert ein partur av stovnsmetingini.

Fiskifrøðingarnir vísa á, at fiskastovnarnir eru hart royndir, og at tað er tilgongdin av ungfiski, sum í stóran mun ger av, hvussu stórir fiskastovnarnir eru einstøku árini. Tilgongdin til hesar tríggjar stovnarnar í ár er ikki góð, og roknað verður við, at stovnarnir tí eru í minking. Hvussu fiskurin veksur, hevur sjálvandi eisini týdning fyri stovnsstøddina, og í ár vísa kanningarnar, at toskurin og hýsan eru hampiliga fyri, meðan serliga upsin vísir seg at vera illa fyri.

Sambært fiskifrøðingunum hevur serliga toskurin alla vernd fyri neyðini. Hvítingsbróður og lítli kongafiskurin tykjast at vera heilt væl fyri, meðan nógv minni er fingið av svartkjafti í mun til í fjør. Somuleiðis vóru nøgdirnar av gulllaksi, havtasku, reyðsprøku og tungu minni í ár enn undanfarna ár.

## Fiskavirkini

Í 2006 eru fíggjarligu úrslitini hjá flakavinnuni nakað frægari enn undanfarna ár. Roknskapartøl og fyribilsúrslit, sum Ráfiskakeyparafelagið frá limunum hevur fingið vitan um, vísa, at í 2006 var samlaða úrslitið hjá vinnuni umleið null – hvørki yvir- ella undirskot. Hetta er frægari enn í 2004 og 2005, tá hallið var ávíkavist góðar 40 mió kr. og 15 mió kr., men tó ikki nøktandi, um vinnan sum heild skal klára seg framyvir.

Orsøkirnar til betraðu úrslitini eru fyrst og fremst at finna á marknaðinum, sum hevur víst seg at roynast munandi betri í 2006 enn undanfarnu tvey árini. Dollarin var høgur í 2006, og hevur hetta ávirkan á úrslitini hjá vinnuni. Hinvegin so er dollarin, nú komið er út í 2007, á søguliga lágum støði.

Kappingin um føroysku rávøruna er framvegis sera hørð. Sokallaði Hoyvíkssáttmálin kom í gildi í 2005, og eisini var kumuleringsavtalan við ES fingin í lag. Tað verður tó ikki mett, at møguleikin at keypa rávøru úr Íslandi og Noregi hevur bøtt nakað serligt uppá rávørutilgongdina til føroysku virkini.

## Alivinnan

Føroyska framleiðslan av laksi og sílum er fallin nógv seinastu árini. Frá 56.000 tonsum, tá framleiðslan var størst, heilt niður á 18.000 tons í 2006. Í 2007 verður roknað við, at framleiðslan fer at økjast aftur. Framskrivingarnar siga, at umleið 30.000 tons fara at verða tikin í 2007, og mett verður, at í 2008 fer framleiðslan at fara upp um 30.000 tons. Karmarnar um alivinnuna eru yvirhøvur góðir, og vinnan hevur seinasta árið víst nøkur góð úrslit, tá tað kemur til vøkstur og felli, og harafturat hava eingir sjúkutilburðir verið. Saman við sera góðum marknaðarprísi hevur hetta gjørt, at fyritøkurnar, sum hava havt fisk at taka, hava havt góð úrslit í 2006.

Roknað verður við, at útboðið av laksi á marknaðinum næsta ár fer at økjast munandi. Hetta fer óiva at trýsta marknaðarprísin. Alisøgan sigur frá, at prísurin sveiggjar sera nógv, men um føroyska vinnan megnar at hava ein burðardyggan rakstur og fyribyrgja sjúku, skuldi alivinnan klára at liva við teimum príssveiggjum, sum fara at koma.

Í 2006 vórðu átta mió. fiskar settir á sjógv, og roknað verður við, at umleið nýggju mió. verða settir út í 2007. Roknað verður við, at í 2008 verða umleið 10 mió settir á sjógv. Vøksturin í framleiðsluni komandi árini fer at geva vinnuni avbjóðingar, men nevndin í Havbúnaðarfelagnum er sannførd um, at vinnan í størri mun enn fyrr er før fyri at taka hesar avbjóðingar.

## Uttanlandshandilin

Mynd 6 vísir handilsjavnan yvir eitt longri tíðarskeið.

Síðst í 90unum var vøkstur bæði í innflutningi og í útflutningi, har yvirskot var á handilsjavnanum. Eftir aldarskiftið flataði út, og bæði innflutningur og útflutningur hava verið støðug, har útflutningurin er fallin nakað, meðan innflutningurin hevur sveiggjað alt eftir, um skip hava verið innflutt.

Undirskot hevur verið á handilsjavnanum síðani 2002, og serliga í 2006 og 2007 hevur undirskotið táttað í eina milliard krónur.

Tað, sum vert er at býta merki í, er, at innflutningurin uttan skip og fløgfør er vaksin heilt nógv seinasta ári. Innflutningurin er vaksin úr ongum til 22%.




- Mynd 6: Handilsjavnin




- Mynd 7: Innflutningur, við og uttan skip / flogfør

Verður sæð burtur frá skipum og flogførum, hevur stórur vøkstur verið í innflutninginum seinasta árið. Tó hevur lækking verið undanfarnu fimm árini. Innflutningsvøksturin í fjør stavar einamest frá innflutningi av nýtsluvørum, tilfar til byggivinnu og framleiðsluútgerð. Hinvegin hevur skipainnflutningurin í mun til undanfarin ár verið lægri.

Verður hugt nærri at tølunum sæst, at nýtsluvørur eru hækkaðir 14%, bilar 8%, brennievni 20%, byggivinnan 21%, alivinnan 19% og maskinur og útgerð 38%.

## Tað almenna

Talvurnar niðanfyri vísa gongdina í inntøkum og útreiðslum hjá landskassanum síðstu árini.

Inntøkur landskassans[2]:

[2] Kelda Fíggjarmálaráðið, frágreiðing í samband við fíggjarlógina 2007. Fram til 2005 eru roknskapartøl nýtt, meðan tølini fyri 2006 eru metingar, og 2007 eru frá fíggjarlógini.

| | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Skattainntøkur | 1.567 | 1.675 | 1.581 | 1.539 | 1.508 | 1.613 | 1.701 |
| Avgjaldsinntøkur | 1.148 | 1.239 | 1.274 | 1.259 | 1.322 | 1.579 | 1.627 |
| Ymiskar inntøkur | 90 | 58 | 81 | 41 | 67 | 98 | 88 |
| Heildarveiting o.t. | 995 | 629 | 632 | 633 | 631 | 635 | 635 |
| **Samlað** | 3.800 | 3.601 | 3.568 | 3.472 | 3.528 | 3.925 | 4.051 |

Útreiðslur landskasans:

| | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur | 2.846 | 3.147 | 3.192 | 3.324 | 3.467 | 3.577 | 3.693 |
| Løguútreiðslur | 180 | 240 | 262 | 228 | 201 | 291 | 261 |
| Rentuútreiðslur | 76 | 24 | 91 | 72 | 71 | 7 | 22 |
| **Samlað** | 3.102 | 3.411 | 3.545 | 3.624 | 3.739 | 3.875 | 3.976 |

Ikki óvæntað er tað raksturin, sum er tann størsti útreiðsluposturin, og hann er hækkaður nakað øll árini. Hækkingin seinastu árini hevur ligið á uml. 3-4%, og eisini ætlanirnar fyri 2007 eru á sama støði.

Meðan vit bæði í 2004 og 2005 høvdu hall á fíggjarlógini, verður úrslitið positivt í 2006 og eisini sambært ætlanunum fyri 2007. Hetta hóast skattalættar verða givnir bæði hesi árini. Hetta er at frøðast um, tí tað er ikki rætt at landskassin hevur hall fleiri ár á ræð í góðum tíðum.

Vit hava fyrr gjørt vart við, at løgurnar einstøk ár ikki hava fylt nógv á fíggjarlógini, í mun til raksturin. Tað er av týdningi, at landið heldur eitt javnt og lutfalsliga høgt støði í sínum løgum, tí hesar eru ein av fortreytunum fyri búskaparligum vøkstri. Samstundis eigur tað almenna í størri mun loypandi at eftirkanna, hvar effektiviseringar kunnu fremjast og rakstrarútreiðslurnar harvið lækkast.

## Niðurstøða um búskapargongdina

Føroyski búskapurin er sum heild rættuliga væl fyri. Ferð er rættiliga komin á búskapin aftur, og tí er neyðugt, at landsstýrið hevur eitt vakið eyga við, um neyðugt er at tátta í. Ivasamt er, um tað er rætt í verandi støðu, at hallið á fíggjarlógini heldur áfram. Hjá fiskiflotanum gongur sum heild rímiliga væl, meðan tað á flakavirkjunum er trupult at røkka nøktandi úrslit. Alivinnan sprettir aftur og fer at geva sítt íkast til búskapin.

Eitt nýtt bein at standa á hevur ivaleyst sæð dagsins ljós. Peningastovnar eru farnir uttanlands, og í framtíðini kann væntast, at hendan vinnan fer at framleiða fremmant gjaldoyra – á sama hátt sum serliga fiskivinnan, alivinnan og ferðavinnan. Greiðir ágóðar eru av hesum. Útflutningurin verður í minni mun tengdur at fiski, og fremmant gjaldoyra kann framleiðast uttan stórvegis nýtslu av føroyskari arbeiðsmegi.

Nógvu eigaraskiftini í vinnuni hava hildið áfram farna árið. Tey bera, sum vit staðfestu í fjør, boð um økt virkisfýsni og dynamikk í vinnuni, samstundis sum hetta vísir, at vinnulívið er bjartskygt og trýr á framtíðina.

Væntandi fer dynamikkurin at koma í hæddina, tá ið stóru føroysku fyritøkurnar vera einskildar. Tí kann roknast við, at búskapurin fer at fáa meira ferð á, enn vit síggja í dag, og vit fara sannlíkt at økja livistøðið í samfelagnum við ferð innan heilt fá ár, um rætt verður borið at.

Størsta forðingin eru stirvnu karmarnar um útlendska arbeiðsmegi. Um tey fýra frælsini kunnu flyta frítt um landamørk, eins og í ES- og EBS-londunum, fer dynamikkurin eisini at økjast munandi.

# Gongdin innan einstøku vinnugreinarnar

## Fiski- og flakavinnan

Samlaði føroyski útflutningurin av fiskavørum í nøgd og virði er vístur í myndini niðanfyri. Myndin vísir, at samlaða nøgdin er minkað síðan 2003, og er hetta serliga orsakað av gongdini í alivinnuni. 2006 var árið, har útflutningurin av laksi og sílum varð ein tann lægsti í nógv ár. Útflutningsvirðið minkaði somuleiðis frá 2002 til 2005, men í 2006 er tað hækkað nakað aftur og liggur nú á umleið 3,5 mia. kr.




- Mynd 8: Útflutningur av fiskavørum nøgd og virði frá 2000 til 2006

## Fiskavirkini

Í 2006 eru fíggjarligu úrslitini, sum staðfest frammanfyri, frægari enn undanfarna ár. Roknskaparúrslit og fyribilsúrslit liggja um eitt samlað null – hvørki undir- ella yvirskot. Hetta er væl frægari enn í 2005, tá samlaða hallið var meira enn 15 mió. kr., men als ikki nøktandi. Orsøkirnar til betringina í úrslitunum eru fyrst og fremst at finna á marknaðinum, sum hevur víst seg at roynast munandi betri í 2006 enn undanfarnu árini.

| | Nøgd í tonsum | | Virði í 1.000 kr. | | Miðalprísur/kg. | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | **2005** | **2006** | **2005** | **2006** | **2005** | **2006** |
| Flak, fryst og kølt | 25.794 | 26.452 | 597.973 | 718.724 | 23,18 | 27,17 |
| Saltfiskur, flaktur og flak | 14.113 | 12.720 | 421.642 | 354.967 | 29,88 | 27,91 |
| Heilur fiskur, frystur og køldur | 27.337 | 17.646 | 306.346 | 269.302 | 11,21 | 15,26 |

- Mynd 9: Útflutningur býtt á vørubólkar av toski, hýsu og upsa

Samlaði útflutningurin av flaki – frystum og køldum burturúr toski, hýsu og upsa øktist við umleið 1.500 tonsum frá 2005 til 2006, meðan virðið øktist við góðum 100 mió. kr. Nøgdirnar av útfluttum saltfiski eru minkaðar við 2.500 tonsum, og miðalprísurin á saltfiski er minkaður nakað í mun til undanfarna ár. Nøgdin av frystum og feskum óvirkaðum fiski er minkað nakað í 2006 í mun til 2005, tó ikki tilsvarandi nógv í virði. Sum mynd 9 vísir, er miðalprísurin á heilum frystum og feskum fiski hækkað við umleið 2 kr. pr. kg. í tíðarskeiðnum.

Flakavinnan hevði nøkur góð ár í 2001 og 2002. Í 2003, 2004 og 2005 var raksturin tungur, og fleiri virkir høvdu hall. Í 2006 gekk heldur betur, og eru tað summi virkir sum skarða framúr, meðan onnur virkir framvegis hava hall. Saltfiskavirkini hava ikki gingið so væl í 2005 og 2006 sum undanfarin ár, og er tað fyrst og fremst orsakað av, at sera lítið av toski hevur verið at fingið til framleiðslu, og kappingin um tann toskin, sum er, hevur verið sera hørð. Marknaðarprísurin á saltfiski hevur hildið sær væl, men verður framvegis settur undir trýst serliga frá íslendskum framleiðarum, sum eru komnir inn á sama marknað, sum føroyingar hava verið á í Spaniu seinnu árini.

### Rávørutilgongdin til vinnuna

Um hugt verður eftir fiskiskapinum undir Føroyum seinastu árini, kann staðfestast, at feskfiskaveiðan lækkaði eitt vet í 2006 í mun til 2005. Nøgdin var á góð 134.000 tons. Virðið á feskfiskaveiðuni er tó økt nakað í 2006 í mun til 2005. Í talvu 10 sæst, at sjálvt um nøgdirnar á hýsu og upsa eru nakað minni í 2006 enn í 2005, er virðið á hesum fiskasløgum økt. Myndin vísir eisini, at veiðan eftir øðrum fiskasløgum er økt nakað væl í 2006 í mun til 2005. Hetta er fyrst og fremst veiðan eftir gulllaksi, sum øktist frá knøppum 7.000 tonsum í 2005 til góð 12.000 tons í 2006.

| | Nøgd í tons | | Virði í 1.000 kr. | | Miðalprísur pr. Kg | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Fiskaslag** | **2005** | **2006** | **2005** | **2006** | **2005** | **2006** |
| **Toskur** | 18.879 | 13.599 | 340.222 | 263.096 | 18,02 | 19,35 |
| **Hýsa** | 19.977 | 16.574 | 198.704 | 201.311 | 9,95 | 12,15 |
| **Upsi** | 62.077 | 60.140 | 248.494 | 314.116 | 4,00 | 5,22 |
| **Annar botnfiskur** | 12.701 | 15.954 | 114.624 | 178.970 | 9,02 | 11,22 |
| **Flatfiskur tils.** | 7.214 | 7.032 | 191.771 | 200.698 | 26,58 | 28,54 |
| **Onnur fiskasløg tils.** | 13.900 | 20.886 | 52.570 | 89.456 | 3,78 | 4,28 |
| **Veiðan tilsamans** | 134.747 | 134.185 | 1.146.385 | 1.247.645 | | |

- Mynd 10: Feskfiskaveiða í nøgd, virði og miðalprísur 2005 og 2006

Minking er í toskafiskiskapinum fjóðra árið á rað. Fiskiskapurin eftir toski er minkaður úr umleið 25.000 tonsum í 2004 til smá 19.000 tons í 2005, og í 2006 eru fiskað 13.600 tons av toski. Vert er at minnast til, at í 2005 fiskaðu lemmatrolarar á Íslandsrygginum, meðan tað í 2006 ikki varð fiskað nógv har.

Fiskiskapurin eftir hýsu er somuleiðis minkaður triðja árið á rað, og er veiðan í 2006 góð 16.000 tons. Miðalprísurin bæði á toski og hýsu hækkaði í 2005 við millum 2 og 3 kr. kg. í mun til 2004, og í 2006 er toskaprísurin aftur hækkaður eina góða krónu í mun til 2005. Hýsuprísurin er hækkaður við góðum tveimum kr. í tíðarskeiðnum. Miðalprísurin á upsa hækkaði eina knappa krónu frá 2004 til 2005, og er aftur hækkaður við 1,22 kr frá 2005 til 2006. Upsaprísurin er nú komin uppaftur á prísstøðið, sum var í 2000-2002.

Verður hugt eftir veiðumynstrinum í fiskiskapinum undir Føroyum fyrstu tveir mánaðirnar í ár í mun til fyrstu tveir mánaðirnar í 2006, vísa hagtølini, at fiskiskapurin í ár er heldur lakari. Fyrstu tveir mánaðirnar í 2006 vórðu knøpp 29.000 tons av fiski veidd í mun til góð 22.000 tons sama tíðarskeið í ár. Fiskiskapurin eftir upsa er lækkaður uml. 3.000 tons, meðan fiskiskapurin eftir toski er góð 500 tons minni í 2007. 100 tons minni av hýsu eru komin uppá land fyrstu tveir mánaðirnar í ár í mun til sama tíðarskeið seinasta ár.

## Alivinnan

Alivinnan sprettir aftur. Í 2003 var alivinnan í stórari kreppu, har bæði sera lágir prísir og umfatandi ILA-sjúka høvdu ávirkan. Meðan kreppan var, innførdi alivinnan saman við politiska myndugleikanum nýggjar og betri karmar. Somuleiðis hevur alivinnan nú ein skynsaman rakstur, har neyv framleiðslustýring er.

Bygt á góðar karmar og nærlagni er alivinnan í dag burðardygg. Hetta sæst aftur í avrikinum, tí fiskurin veksur sera væl og hevur sera lágt felli. Saman við sera høgum marknaðarprísum skapti 2006 høgt avkast í alivinnuni. Alivinnan er í dag ein framleiðin vinna, sum hevur vent einum stórum undirskoti til eitt samlað yvirskot í 2006. Tó var 2006 eyðkent fyri, at sera lítið var av fiski, og nøgdin, sum tikin var, var 18.000 tons í livandi vekt. Høgi prísurin viðførdi hinvegin, at útflutningurin táttaði í eina hálva milliard krónur.

Alivinnan hevur enn ikki staðið royndina, tí vøksturin byrjar ikki fyrrenn nú. Í ár verður mett, at tøkan verður smá 30.000 tons, og at tøkan næsta ár verður omanfyri 30.000 tons. Tað verður tí í nærmastu framtíð, at karmarnir og skynsami raksturin fer at standa sína roynd.

Eisini verður roknað við, at útboðið av laksi á marknaðinum næsta ár fer at økjast munandi. Hetta fer at trýsta marknaðarprísin. Alisøgan sigur frá, at prísurin sveiggjar sera nógv, men um alarar hava ein burðardyggan rakstur og fyribyrgja sjúku, skuldi alivinnan megna at liva við teimum prríssveiggjum, sum fara at koma.

Góðu karmarnir eru serliga bygdir á árgangssundurskiljing, økishvíld og sjúkufyri byrging. Tó eru onkur vandamál við verandi støðu. Serliga tað at laksarogn í dag fyri tað mesta verða innflutt, og útvegararnir eru fleiri.

Bygnaðurin í alivinnuni er nógv broyttur síðani kreppuna, og eru tað færri feløg í vinnuni nú enn fyri nøkrum árum síðani. Ein fyritøka er til sølu í løtuni, og ognarpartar í øðrum alifyritøkum skulu til at skifta hendur. Sostatt verða bygnaðarbroytingar væntandi í ár.

Toskaaling er byrjað í Føroyum, og 130.000 toskar eru undir framleiðslu. Hendan framleiðslan verður tikin á vári næsta ár, og tá verður møguligt at máta avrikið. Umleið 300.000 toskayngul verða klár at seta á sjógv í heyst. Framtíðin fyri toskaaling í Føroyum er bygd á, hvat avkast hon kann skapa, tí

aliøkini í Føroyum eru avmarkað. Í framtíðini fer tí ein kapping millum fiskasløg at fara fram - um aliøkini skulu brúkast til laks, síl ella tosk.

## Framleiðsla

Framleiðslan í alivinnuni vaks nógv frá 1999 til 2003 fyri síðani at minka nógv. Tá tøkan var størst var hon 56.000 tons í livandi vekt. Orsaka av lágum prísum og ILA-sjúku fall framleiðslan í 2004 til 45.000 tons, í 2005 til 22.000 tons, og í fjør var hon bert 18.000 tons.




| | 1996 | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Síl | 915 | 1.440 | 1.260 | 3.292 | 1.315 | 3.126 | 11.149 | 10.220 | 5.092 | 4.493 | 5.496 | 6.270 | 6.000 |
| Laksur | 17.663 | 20.306 | 19.176 | 39.252 | 33.508 | 46.014 | 44.953 | 52.526 | 40.985 | 18.962 | 13.078 | 21.253 | 25000 |

Laksur Síl

- Mynd 11: Tøka fram til 2006 og forsøgn fyri 2007 og 2008 (livandi vekt).

Tøkan í 2006 er tann lægsta síðani aldarskiftið og er ájøvn við tøkuna síðst í 90'unum. Tøkan av laksi var góð 13.000 tons og tøkan av sílum umleið 5.500 tons í livandi vekt.

Men alivinnan sprettir aftur og er í stórum vøkstri. Tøkan í ár, bygt á útsetingar í 2006 fer at tátta í 30.000 tons. Í 2008 verður tøkan væntandi omanfyri 30.000 tons, men vøksturin verður ikki so stórur. Ábendingar eru um, at talið av smoltið, sum verður sett á sjógv næstu árini, fer at liggja um 10 mió. Sostatt kann roknast við, at tøkan um tvey ár verður umleið 40.000 tons í livandi vekt. Við tí bygnaði, sum er í dag í alivinnuni og teimum kørmum, sum eru lagdir, verður roknað við einum støðugari framleiðslu, sum byggir á 10 milliónir smolt.

## Útflutningur

Myndin niðanfyri vísir, at útflutningurin var í hæddini frá 1999 fram til 2003, tá hann táttaði í eina milliard krónur. Síðani er útflutningsvirðið falli niður á umleið hálva milliard seinastu tvey árini. Útflutningsvirðið í ár, er væl hægri enn væntað, tí prísurin í 2006 var einastandandi góður. Um prísurin hevði verið á einari vanligari legu, hevði útflutningurin verið meira enn 100 milliónir lægri.




- Mynd 12: Útflutningur av alifiski í virði frá 1990 til 2008 (Útflutningurin fyri 2007 og 2008 er leysliga mett)

Roknast kann við, at útflutningurin fer at hækka til umleið 600 milliónir krónur í 2008, men fer at sveiggja alt eftir, hvussu marknaðarprísurin fer at hátta sær. Við verandi bygnaði og kørmum fer útflutningurin at liggja á hesum støði.

## Handverksvinnan

Verður hugt at gongdini og lønargjaldingunum innan byggivinnuna, mynd 13, sæst at hesar eru hækkaðar úr 731 til 813 mió. Tað er bæði innan vanligt byggivirksemi og innan smiðju og ídnaðarvirksemi, at vøkstur hevur verið.

Vøksturin innan byggivinnuna hevur sostatt verið 11,23%, og hetta er góð 4 % omanfyri miðal lønarvøksturin.

| **Vinnugrein** | **2000** | **2001** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Skipasmiðjur, smiðjur | 107,9 | 123,6 | 130,1 | 130,9 | 124,7 | 130,6 | 146,0 |
| Ídnaður annars | 177,7 | 200,5 | 219,0 | 223,9 | 218,6 | 223,4 | 230,7 |
| Byggivirksemi | 258,9 | 299,9 | 312,0 | 344,3 | 380,6 | 377,3 | 436,7 |
| *Tilsamans* | 544,5 | 624,0 | 661,1 | 699,1 | 723,9 | 731,3 | 813,4 |
| | | | | | | | |
| **% av samlaðu lønargj.** | 11,61% | 11,83% | 11,52% | 12,09% | 12,35% | 12,18% | 12,66% |
| % vøkstur í lønargjalding, handverksvinnan | | 14,60% | 5,95% | 5,75% | 3,55% | 1,02% | 11,23% |

- Mynd 13: Lønargjaldingar í byggivinnuni

Ein onnur ábending um gongdina innan byggivinnuna er innflutningurin av tilfari og lutum til byggivinnuna. Mynd 14 vísir innflutningin síðan ár 2000. Innflutningurin hækkaði í 2006 20% í mun til árið fyri. Innflutningurin hevur annars verið rættuliga støðugur seinastu árini.

Innflutningurin seinasta árið er soleiðis vaksin væl meira enn lønargjaldingarnar í byggivinnuni, hóast hesar eisini eru voksnar nógv.

Alt í alt gevur hetta eina greiða mynd av, at ferð er á byggivinnuni. Leiðslurnar í byggifyritøkum siga tó, at trotið á arbeiðamegi ger økta aktivitetin sera torføran og lítið lønandi.




- Mynd 14: Innflutningur til byggivinnu í 1.000 kr.

## Olja og frálandavinna

Sjálvt um borðingarnar á føroyskum økið higartil ikki hava givið ítøkilig úrslit, er vert at vísa á, at virksemi rundan um oljuna hevur kastað av sær á annan hátt. Tey bæði oljufeløgini, sum eru sprottin úr føroysku oljuleitingini, standa seg sera væl, og tey hava so líðandi økt um sín leiklut í oljuloyvum í grannalondunum. Marknaðarvirðið á teimum er vaksið so nógv, at tey, hóast starvsfólkatalið er avmarkað, í virði teljast millum stórstu føroysku fyritøkurnar.

Eisini menningin av fyritøkum sum Thor, sum í 2006 gjørdist Ársins Virki, og Simprentis, ið selur "e-learning" til oljuvinnu um allan heim, er tengt at oljuleitingini á heimligu leiðunum.

## KT-vinnan

KT-felagið hevur seinasta árið brúkt meginpartin av orkuni uppá at fáa gjørt eina strategi fyri KT-vinnuna. Strategiin er liðug og hevur verið nógv frammi í fjølðmiðlunum, umframt at felagið hevur havt kunnandi fundir við landsstýrismenninar í vinnumálum, mentamálum og fíggjarmálum.

Í stuttum kann sigast, at KT-felagið mælir til, at útbúgving verður sett á stovn á Fróðskaparsetrinum innan KST, og at neyðugur peningur verður settur av á fíggjarlógini til hetta. Somuleiðis mælir KT-felagið til, at ein serfrøðingaskipan verður gjørd, har fólk við serstøkum førleika síggja fyrimunir í at koma til Føroya at arbeiða. Seinasta tilmælið er, at tað almenna skipar sín innkeypspolitik soleiðis, at føroysk vinna fær høvi at bjóða uppá at gerast veitari til tað almenna, sum í mongum førum er ein krevjandi keypari av KST.

## Handil og privatar tænastur

Gongdin innan handilsvinnuna avspeglast væl í innflutninginum til beinleiðis nýtslu. At framgongd hevur verið í búskapinum síðsta árið sæst tíðiliga aftur í

hesum tølum. Innflutningurin til beinleiðis nýtslu var í fjør 1,29 miliardir krónur, ella 159 miliónir meira enn í 2005.

Vøksturin í innflutninginum til beinleiðis nýtslu var nærum eingin í 2003 og 2004. Í 2005 var vøksturin 3,8%, og í fjør kom vøksturin upp á heili 14,1%.

Vøksturin í innflutninginum til beinleiðis nýtslu var sostatt dupult so stórur sum í tíðarskeiðinum 2000 til 2002, tá hann lá á gott 7%.

Partur

2

# Víðsjón 2015 og nevndararbeiði

## Strategibólkurin hjá FAG

Føroya Arbeiðsgevarafelag setti í 2005 eina strategibólk at viðgera vinnu- og samfelagsviðurskifti. Bólkurin skuldi koma við tilmælum til, hvat gerast kann fyri at fáa eina produktiva og kappingarføra vinnu og harvið búskaparvøkstur.

Grundin til, at bólkurin var settur, var partvíst tær avbjóðingar, sum altjóðagerðin kann merkja fyri bæði vinnu og samfelag, og partvíst áheitanin frá løgmanni á vinnuna um at spæla ein virknan leiklut í arbeiðinum um víðsjón 2015.

Á heysti 2006 metti bólkurin at hava tænt fyri seg í fyrsta umfari, og tí var hann niðurlagdur. Fýra frágreiðingar komu frá bólkinum, harav tríggjar vóru viðgjørdar í undanfarnu ársfrágreiðing.

### Frágreiðing um arbeiðsmarknaðin

Bólkurin kom á heysti 2006 við einari frágreiðing um, hvussu dynamikkur skal skapast á arbeiðsmarknaðinum. Frágreiðingin var rættiliga beinrakin og erlig, men fekk kaldliga móttøku, tí avgerðirnar, sum frágreiðingin legði upp til, ikki eru “gott latín” hjá politisku Føroyum.

Lagt varð upp til, at skipanir, sum skeikla kappingina á arbeiðsmarknaðinum, skulu beinast burtur, so arbeiðsmegin leitar sær inn í produktivar fyritøkur. Førleiki, áhugi og løn skulu vera avgerandi fyri, hvat arbeiðsmegin fæst við. Stuðulsskipanir gera arbeiðsmarknaðin stirvnan og skerja frælsi hjá føroyingum at velja.

Dynamikkur er komin í føroyska samfelagið. Orsøkin er fyrst og fremst broytingin á peningastovnsmarknaðinum. Henda hevur brotið við stirvna vanahugsan, har fyritøkur nú sum ongantíð fyrr skifta hendur. Í øðrum lagi, er kostnaðurin av at taka lán lækkaður heilt fitt, og sum hevur stimbrað nýtsluna í landinum.

Dynamikkur er enn eftir at vera sleptur leysur. Stórar almennar fyritøkur skulu einskiljast, og tá tað er hent, fer ferðin á búskapinum at hækka.

Arbeiðið, sum strategibólkurin hevur gjørt, hevur birt undir kjak og hevur eisini flutt fatanina av, hvat hevur týdning í samfelagnum. Fatanin av, at føroyingar bert liva av fiski, er kanska broytt. Vit liva ikki av at hava fiskivinnu, men fiskivinnan ger okkum ríkari. Orsøkin er, at vit við avmarkaðari nýtslu av arbeiðsmegi kunnu skapa stóran útflutning, sum vit kunnu innflyta alskyns vørur fyri, sum vit annars høvdu brúkt nógva arbeiðsmegi til at framleitt.

Kanska serliga hevur bólkurin lagt dent á, at útbúgving er vegurin til hægri vælstand, har fólk skulu stimbrast at fáa sær eina útbúgving ístaðin fyri at stuðla ófaklærdari arbeiðsmegi.

### Víðsjón 2015 var ein vekingarrørsla

Arbeiði rundan um Víðsjón 2015 tykist at hava fingið sín enda, og bókin við samlaðu tilmælunum er komin út.

Ført verður fram, at ov nógv orka er brúkt til hesa ætlan, sum ístaðin skuldi verði brúkt aðrastaðni - at hon bar ongan veg, og tí bert var ein hvørvisjón hjá løgmanni.

Føroya Arbeiðsgevarafelag er tó av tí fatan, at hon hevur gjørt mun. Hon hevur skapt eitt kjak millum fólk – í øllum liðum í samfelagnum og kanska í hvørjum heimi í Føroyum.

Hon hevur vakt føroyingar til at seta sær spurningin, um vit kunnu skipa samfelagið øðrvísi. Hon hevur fingið føroyingar at spyrja seg sjálvar, hvat tað góða samfelagið skal innihalda. Hon hevur opnað tað annars so vanabundna og stirvna sinnið.

Víðsjónin hevur verið eitt slag av "vekingarrørslu". So sjálvt um einki ítøkiligt er komið burturúr, hevur hon kveikt ein neista í føroyingum, sum sigur, at vit megna eins væl og onnur at skapa okkum eitt livistøði, sum er eins høgt ella hægri enn hjá øðrum.

Eins og vit hava sæð við øðrum frágreiðingum, sum stungu út í kortið, vilja partar av tilmælunum ivaleyst síggjast aftur í politisku ætlanunum komandi árini, uttan mun til hvørjir flokkar koma at mynda landsstýrið.

Ítøkilig úrslit krevja tó, at politikkarar raðfesta, stinga út í kortið og seta loysnir í verk.

## Bóklingur um samspælið millum nevnd og stjórn

Føroya arbeiðsgevarafelag lat ein bókling úr hondum í fjør. Hann viðgjørdi samspæli millum nevnd og sjórn í føroyskum fyritøkum. Hetta var eisini evnið á seinasta vinnudegi, og bóklingurin varð útgivin í tí sambandinum.

Bóklingurin var bygdur á eina kanning av føroyskum fyritøkum, har hugt var eftir, um nevndir høvdu eitt vælskipað og professionelt arbeiði. Ásannað varð, at í stórum føroyskum fyritøkum var nevndararbeiðið vælskipað, men ikki eins væl í smærri fyritøkum.

Ein av niðurstøðunum, sum Arbeiðsgevarafelagið hevur tikið til sín, var tørvurin á at kunna um, hvussu nevndararbeiði kann vera skipað. Í hesum sambandi hevur Arbeiðsgevarafelagið sett ein skeiðsdepil á stovn nevndur Vinnunám, har skeið verða bjóðað út, sum skulu stimbra bæði stjórnar- og nevndararbeiði í føroyskum fyritøkum.

Partur
3

# Virksemið í 2006/07

**Lýsing av pørtum av virkseminum í Føroya Arbeiðsgevarafelag og í Vinnuhúsinum**

Nýggja tøknin ger, at kunningin frá FAG til limirnar er øðrvísi. Felagið kunnar nú leypandi um virksemi sítt. Tíðindi verða hvønn mánamorgun løgd út á heimasíðuna hjá Vinnuhúsinum.

Hesin arbeiðsháttur merkir, at limirnir fáa regluliga kunning, og tí er minni tørvur at lýsa einstøk mál í ársfrágreiðing felagsins.

## Sáttmálaviðurskifti og føroyski arbeiðsmarknaðurin

### Sáttmálasamráðingar í 2007

#### Sáttmálasamráðingarnar við arbeiðarafeløgini

Aðalfundur felagsins, har henda frágreiðing verður framløgd, er í ár hildin rættuliga seint, og tí eru samráðingarnar við øll arbeiðarafeløgini farnar afturum.

Øll fimm arbeiðarafeløgini søgdu sáttmálarnar upp at fara úr gildi 1. mai 2007. Arbeiðarafeløgini eru Havnar Arbeiðskvinnufelag, Havnar Arbeiðsmannafelag, Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag, Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag og Føroya Arbeiðarafelag. Arbeiðarafeløgini valdu at samráðast saman.

Støðan innan samráðingarnar var, at stórur tørvur var á arbeiðsmegi innan flestur vinnugreinar. Lønarvøksturin, sum var avtalaður í 2005, var samstundis á einum sera rímuligum støði, einamest tí at júst áðrenn sáttmálasamráðingarnar 2005 var stígur í búskapinum. Arbeiðarafeløgini valdu tá at leggja allan lønarvøksturin á eftirlønina.

Afturat hesum kom, at beint undan samráðingunum høvdu arbeiðarafeløgini fingið gjørt eina kanning av keypiorkuni hjá einum føroyskum arbeiðara, sum vísti, at keypiorkan var munandi lækkað síðstu trý árini. Føroya Arbeiðsgevarafelag tók ikki undir við háttinum kanningin var gjørd, og vísti henni aftur.

Arbeiðsgevarafelagið væntaði tí, at samráðingarnar í ár fóru at gerast truplar, og so var. Sáttmálasamráðingarnar byrjaðu 20. apríl og samráðst var inntil á kvøldi 30. apríl, tá komið var á mál við øllum uttan lønini. Eisini var semja um gistingarhús- og matstovusáttmálan undirskrivað. Tá var sum so ofta fyrr bert lønin eftir at samráðast um, men tað var ógjørligt at fáa arbeiðarafeløgini inn í veruligar samráðingar um lønina.

Semingsmenninir vóru tilkallaðir. Innkallað varð til seming 7. mai. Dagin eftir varð trý-ára semja við einum samlaðari útreiðsluøking hjá arbeiðsgevarunum uppá 9,67% undirskrivað.

Umframt ymsar dagføringar av sáttmálaásetingum, fevnir semjan um lønarhækking, eftirlønarhækking og hækking í starvstíðarviðbótunum.

Avtalaðu lønarhækkingarnar verða hesar:

1. mai 2007 hækkar grundlønin við 2,22 kr

1. mai 2008 hækkar grundlønin við 2,32 kr

1. mai 2009 hækkar grundlønin við 2,42 kr

Eftirlønin hækkar við 1% hvørt árið, og verður sostatt 9,1% hin 1. mai 2009.

Starvstíðarviðbøturnar verða nú eisini givnar fyri 7 ára starvstíð, og starvstíðarviðbøturnar eru broyttar úr krónugjøldum til prosentgjøld. Harafturat eru gjøldini fyri skiftisvaktir hækkaði, samstundis sum skipanin verður meiri liðilig við tað, at nú kann eitt virki arbeiða í skiftisvakt á á einstøkum deildum.

Partarnir hava harafturat undirskrivað protokollat um rúmliga arbeiðsmarknaðin og gjørt ymsar tillagingar í sáttmálanum og álitismannaskipanini.

Føroya Arbeiðsgevarafelag metir úrstlitið av samráðingunum vera brúkiligt, serliga tá hugsað verður um, at friður er tryggjaður á hesum sáttmálaøkinum fram til mai mánaða 2010. Leggjast kann tó afturat, at keðiligt er, at ikki bar til at fáa veruligar samráðingar um lønina, fyrrenn semingsmenninir vóru tilkallaðir.

### Protokollat um rúmliga arbeiðsmarknaðin

Føroya Arbeiðsgevarafelag ásannar, at í føroyska samfelagnum er ikki ráð til at lata arbeiðsmegi vera ótroytta, og er tískil væl nøgt við, at tað undir sáttmálasamráðingunum við arbeiðarafeløgini var semja um hetta protokollat:

"Í sambandi við sáttmálasamráðingarnar 2007 millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðskvinnufelag, Havnar Arbeiðsmannafelag, Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag og Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag vóru partarnir samdir um hetta protokollat um rúmliga arbeiðsmarknaðin.

Sum útgangsstøði eru partarnir samdir um, at yvirskipaða sosiala ábyrgdin liggur hjá landstýri og løgtingi. Samstundis er tilknýti hjá einstaka borgarinum til arbeiðsmarknaðin av stórum týdningi sosialt og sálarfrøðiliga.

Partarnir meta, at í einum vælskipaðum samfelag eiga allir arbeiðsførir borgarar at hava møguleika at átaka sær arbeiðsuppgávur, sum liggja innan fyri teirra førleikakarm. Tí hevur tað týdning, at so nógvir borgarar sum gjørligt koma á og vera verandi á arbeiðsmarknaðinum.

Arbeiðsmarknaðurin má vera liðiligur, soleiðis at so nógv sum gjørligt fáa arbeiði í boði gjøgnum alt arbeiðslívið uttan mun til førleika.

Partarnir eru samdir um at fremja starvssetanir av fólki við skerdum førleika. Hetta kann m.a. gerast so at hesir starvsfólkabólkar fáa serliga tillagaðar setanartreytir. Við støði í vanligu ásetingunum í sáttmálanum eigur sostatt at bera til at lata arbeiði verða gjørt undir serligum treytum."

## Gjógvin er ein myta

Undir sáttmálasamráðingunum almannakunngjørdu arbeiðarafeløgini eina kanning, har hugt var at lønarmuni millum teirra limir og aðrar bólkar. Arbeiðsgevarafelagið vildi ikki viðgera kanningina alment undir

sáttmálasamráðingunum, tí tá eiga partarnir at fáa frið at samráðast, men felagið vísti tó á, at kanningin var villleiðandi, millum annað tí at tíðarskeiðið kanningin fevnir um bert er trý ár.

Arbeiðarafeløgini komu síðan við einum ískoyti, ið fevndi um 20 ár. Tølini frá Hagstovu Føroya vísa, at lønarmunurin millum ein arbeiðara og ein starvsmann í hesum tíðarskeiði er minkaður frá 26% til 21%. Og lønarmunurin millum ein arbeiðara og ein tænastumann er í sama tíðarskeiði minkaður frá 70% til 52%.

Tað ber eisini til at hyggja at lønarmuninum millum sáttmálalønina hjá handverkarum og arbeiðsfólki.

Í 1970 var munurin millum eina handverkaraløn og eina arbeiðsmannaløn 28,3%, í 1980 var munurin 18,5%, og í 1990 var munurin komin niður á 13%. Handverksmeistarafelagið og handverkarafelagið vóru síðst í 90'unum samd um, at um munurin á einari handverkaraløn og einari arbeiðsmannaløn fór niður um 15%, fór tað at verða vónleyst at fáa ung fólk at fara í læru. Tí hevur munurin millum sáttmálalønina hjá handverkarum og arbeiðsfólki síðani ligið á umleið 15 prosent.

Ein av grundunum til at lønarmunurin millum arbeiðsfólk og aðrar fakbólkar er minkaður er, at nógv flestu lønarhækkingar teirra seinastu 10 árini eru goldnar í krónum og oyrum og ikki í prosentum.

Tey 10 árini frá 1997 til 2007 hava arbeiðarar tilsamans fingið 30,97 krónur í lønarhækking. Av hesum eru 26,42 krónur lætnar sum krónur og oyru. Hetta merkir, at arbeiðarafeløgini fingu somu hækking í krónum sum t.d. Starvsmannafelagið. Hækkingin í prosentum hjá t.d. Starvsmannafelagnum var sostatt umroknað til eitt krónutal, út frá hægru lønunum hjá umrødda felag.

Tí er lønarmunurin millum arbeiðsfólk og aðrar starvsfólkabólkar ikki breiðkaður, men smælkaður seinastu nógvu árini. Sokallaða "gjógvin" er tí ein myta.

## Samráðingar um sáttmála fyri skrivstovu- og krambafólk

S&K tók seg úr Føroya Arbeiðarafelag 1. januar 2007. Felagið segði sáttmálan fyri kramba- og skrivstovufólk upp at fara úr gildi 1. mai 2007. Vanligt er at taka samráðingarnar upp, eftir at Føroya Arbeiðsgevarafelag og arbeiðarafeløgini eru liðug við sínar sáttmálasamráðingar.

Hetta varð so seinka enn meira, av tí at samráðingar millum Arbeiðsgevarafelagið hjá Fíggjarstovnum í Føroyum og Finansforbundet gjørdust sera drúgvar. Samráðingar byrjaður tískil ikki fyrrenn 7. juni, og tað eydnaðist at koma á mál sama dag.

Semja varð um ein 4-ára sáttmála við einum útreiðslukarmi á 12,88%, sum er tað sama, sum arbeiðarafeløgini fingu. Umframt ymsar dagføringar av sáttmálaásetingum, fevnir semjan um hesar lønar- og eftirlønarhækkingar:

1. mai 2007 hækkar lønin við 1,5% og eftirlønin við 1,85%
1. mai 2008 hækkar lønin við 2,65% og eftirlønin við 1,1%
1. mai 2009 hækkar lønin við 1,75% og eftirlønin við 1,6%
1. mai 2010 hækkar lønin við 1,75% og eftirlønin við 2,0%

Onkur broyting er gjørd í lønartalvuni, og eisini hevur S&K nú fingið vaktargjald inn í sáttmálan.

### Sáttmálasamráðingar fyri framman

Sáttmálin, sum var gjørdur við Maskinmeistarafelagið í 2006, var ein eitt-ára sáttmáli og gekk út 1. juni í ár. Samráðingarnar eru millum FAG og Maskinmeistarafelagið eru ikki byrjaðar enn, orsakað av at samráðingarnar um aðrar sáttmálarnar hava drigið út.

Sáttmálin við Føroya Handverkarafelag og Landsfelag Handverkaranna kunnu verða sagdir upp til 1. oktober. Eisini skal avtalan um sjúkurakt alibrúk endurskoðast 1. oktober.

### Sáttmálasamráðingar hjá øðrum feløgum

Arbeiðsgevarafelagið hjá Fíggjarstovnum í Føroyum – AFF – heldur til í Vinnuhúsinum uttan tó at vera limur í Føroya Arbeiðsgevarafelag.

AFF hevur í ár havt samráðingar við Yrkisfelagið fyri Fíggjarstovnar í Føroyum – YFF – og við Finansforbundet.

Samráðingarnar við YFF, sum fevnir um Yrkisfelagið Trygdina og Starvsfólkafelag Sparikassanna í Føroyum, gingu væl. Semja var um ein karm á 11,32% í eitt 4-ára skeið. Hetta er sama støði, sum tann semjan, sum varð gjørd millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið fyrr í ár.

Verri gekk undir samráðingunum við Finansforbundet, har starvsfólk í Føroya Banka og Trygd eru limir. AFF metti tað hava sera stóran týdning, at somu lønarhækkingar skuldu vera innan alt fíggjarøki, og helt tí fast við karmin, sum givin var YFF. Finansforbundet kravdi hinvegin hækkingar og broytingar, sum merktu eina útreiðsluøking á 18%. Tá tað ikki eydnaðist at koma á mál undir vanligu samráðingunum, vóru semingsmenninir tilkallaðir. Neyðugt var við tveimum semingsumførum og einum eina viku longum verkfalli, áðrenn semja varð millum partarnar. Tá var semja um ein 4-ára sáttmála við eini útreiðsluøking hetta tíðarskeið uppá 11,92% umframt eina inflatiónstrygging tað fjórða árið.

## Útlendsk fakfeløg í Føroyum

Arbeiðssteðgurin á føroyska peningastovnsøkinum hevur fingið Føroya Arbeiðsgevarafelag at reisa spurningin um leiklutin hjá útlendskum fakfeløgum í Føroyum.

Arbeiðsgevarafelagið heldur tað vera heilt burturvið at tað ber til hjá útlendskum fakfeløgum at virka her. Hetta skapar fullkomuliga ójavnvág í einari skipan, sum júst er grundað á javnvág millum tveir partar - arbeiðsfólk og arbeiðsgevarar í einum øki.

Arbeiðssteðgurin, sum av álvara varpaði ljós á henda trupulleikan, fevndi bara um limir í einum av fakfeløgunum á hesum økinum. Hitt fakfelagið Yrkisfelagið hjá Fíggjarstovnum í Føroyum, sum fevnir um SFS (Starvsfólkafelag Sparikassanna í Føroyum) og YT (Yrkisfelagið Trygdin), og sum umboðar 70% av starvsfólkunum á fíggjarøkinum, gjørdi fyrr í vár ein nýggjan 4-ára sáttmála við Arbeiðsgevarafelagið hjá Fíggjarstovnum í Føroyum.

Arbeiðssteðgurin fevndi bert um danska Finansforbundet, sum umboðar starvsfólk í Føroya Banka og Trygd. Hetta er bert aðru ferð í søguni, at Finansforbundet fer í verkfall. Fyrra verkfallið var í Grønlandi í 2005. Í

Danmark hevur ongantíð verið eitt verkfall á fíggjarøkinum, síðani fakfeløg vóru stovnað í 1939.

Tað ber tí til at staðfesta, at meðan arbeiðssteðgur ongantíð í nærum sjeyti ár er komin fyri í danska fíggjarheiminum, hevur hetta fakfelag valt at vísa vøddar sínar í bæði Føroyum og Grønlandi.

Hetta er uttan iva funnin frensur hjá danska fakfelagnum. Kostnaðurin av at taka eitt verkfall í Grønlandi ella Føroyum er lítil, bæði í krónum og í umdømi. Samstundis kann eitt slíkt verkfall brúkast til at vísa veruliga mótpartinum hjá fakfelagnum – danska fíggjarheiminum, at talan er um eitt fakfelag, sum torir at bíta frá sær. Hinvegin er ein arbeiðssteðgur innan danska fíggjarheimin ein óhugsandi tanki, og tí er hetta heldur ongantíð komið fyri. Um tað kom so vítt, hevði danska fólkatingið helst beinan vegin lagt seg út í trætuna.

Eitt útlendskt fakfelag, sum ikki hevur sítt dagliga virki í Føroyum, fer ongantíð at kenna somu ábyrgd fyri okkara samfelag, á sama hátt sum tey, ið búleikast her.

Á føroyska arbeiðsmarknaðinum hava vit harafturat egna siðvenju og lóggávu, sum víkjur frá danskari siðvenju og lóggávu, og ivamál kunnu stinga seg upp um, hvør støðan reint løgfrøðiliga tá er.

Føroya Arbeiðsgevarafelag loyvir sær at seta spurnartekin við, um tað yvirhøvur eigur at bera til, at útlendsk fakfeløg eru virkin her á landi? Um nú S&K valdi at gerast limur í systurfelagnum í Svøríki, skuldu føroyski arbeiðsmarknaðurin so fáa sett krøv, sum taka støði í svenskum arbeiðsmarknaðarviðurskiftum? Skuldu ein svenskur sáttmáli verið galdandi á økinum? Skuldu vit tosað svenskt undir sáttmálasamráðingunum? Hvar er markið?

Føroya Arbeiðsgevarafelag ætlar at taka umrødda spurningin upp, bæði við føroysku fakfeløgini og myndugleikarnar.

## Arbeiði við nýggjari semingslóg

Eftir at avtalan um Fasta Gerðarrætt kom í lag í 2006, er av álvara farið undir arbeiðið við nýggjari semingslóg. Arbeiðið gongur spakuliga framá, men enn eru nakrir knútar eftir at loysa. Gongur eftir ætlan verður bólkurin liðugur við sítt arbeiði tíðliga í heyst.

Fyri Føroya Arbeiðsgevarafelag er tað av stórum týdningi, at ein møgulig nýggj semingslóg fer at fevna um allan føroyska arbeiðsmarknaðin, og at semingsmannaskipanin verður meira fastgrógvin í einum stovni.

## Vegleiðing um setunarviðurskiftir á www.industry.fo

Vinnuhúsið hevur seinastu árini savna ymiskar hentar og einfaldar vegleiðingar til virkini í sambandi við setanar- og sáttmálaviðurskifti.

Talan er t.d. um setanarvegleiðingar fyri ymiskar starvsbólkar, so sum arbeiðarar, formenn og starvsmenn. Eisini er vegleiðing gjørd um lærlingaviðurskifti.

Hetta skuldi gjørt tað lættari hjá virkjum at síggja, hvørji viðurskifti hugsast skal um, tá fólk verða sett í starv.

Vegleiðingarnar lýsa rættindi og skyldir hjá pørtunum. Til dømis er vegleiðingin um lærlingaviðurskifti fyri handverkslærlingar gjørd út frá galdandi lógarteksti (serliga yrkisútbúgvingarlógini), avtaluni millum handverksmeistarafelagið og handverkarafeløgini um lærlingar og praksis annars.

## Vinnunám

Á heysti 2006 fór Vinnuhúsið undir at bjóða skeið og tiltøk undir heitinum Vinnunám til limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag og arbeiðsgevarafeløgum undir hesum.

Endamálið er at vera við til at økja um fakliga førleikan hjá fyritøkum - bæði á leiðslustøði, men eisini innan ítøkiligar partar av gerandisdegnum í eini fyritøku.

Málið hjá Vinnunám er at bjóða limunum dygdarskeið og kunningardagar, sum eru beinrakin og viðkomandi fyri vinnuna.

Umframt skeið er eisini ætlanin, at Vinnunám seinni fer at samanseta netverk av ymsum slag.

Síðan byrjan hevur Vinnunám skipa fyri skeiðum um evnir sum t.d. starvsfólkasetan, coaching, nevndararbeiði og byggijura, umframt kunningardagar um skjalamannagongdir í samband við innflutning og útflutning.

## Tiltøk 2006/07

### Vinnudagurin 2006

Fríggjadagin 22. september 2006 varð vinnudagurin hildin á sjeynda sinni. Tiltakið fekk aftur í 2006 sera góða undirtøku, og ikki øll, sum ynsktu, fingu atgongumerki til dagin.

Ársins Virki 2006 gjørdist P/F THOR í Hósvík, sum er eitt reiðaravirki við virksemi kring allan knøttin, og sum tískil hevur eitt rættuliga breitt virksemisgrundarlag. Á vinnudegnum í Norðurlandahúsinum grundgav dómsnevndin millum annað soleiðis:

“Talan er um eitt reiðaravirki, sum støðugt hevur brotið upp úr nýggjum. Tað hevur lagt seg eftir ótraditionellum fiskasløgum og fiskileiðum við góðum úrsliti, og hevur um somu tíð við hegni differentierað sítt virksemi til eisini at fevna um tænastur innan oljuleiting, har tað veitir hjálparskipatænastur til frálandavinnuna í 50 londum kring allan knøttin (Evropa, Asia, Suður- og NorðurAmerika og Afrika). Menningin er farin fram, meðan oljuprísurin var lágur, og oljufeløgini aftraðu seg at leita eftir olju á óvissum oljumótum. Menningin er eisini farin fram, meðan dollarvirðið hevur verið óvanliga lágt. Hesar umstøður hava ikki hildið felagnum aftur í at leggja sær eina við at lúka øll krøv til góðsku, umhvørvi og trygd, sum nýmótans vinna krevur. Hetta hevur givið útslit, og í dag ræður virkið yvir 22 skipum, av hesum 15 innan oljuvinnu. Nærum 450 fólk starvast hjá fyritøkuni. Í ár hevur tað gjørt sáttmála um at byggja supportskip í Føroyum.

Fyritøkan hevði í 2005 eitt ognaravkast upp á 22 % og eitt eginpeningsavkast upp á 49 %. Eginpeningurin var upp á knappar 30 mió. kr. og soliditeturin 39 %."

Aftur hesuferð varð eisini Ársins Átak valt, og var tað blaðið Vinnuvitan. Dómsnevndin vísti á týdningin av, at fjórða statsmaktin, fjølmiðlarnir, eru virknir, og at fokus ikki í nóg stóran mun hevur verið sett á vinnulívið í Føroyum. Tað hevur týdning at hava ein fjølmiðil, sum lýsir handilssliga og búskaparliga rákið, og sum viðger gongdina hjá einstaka virkinum. Hetta er við til at fremja vinnuhugburð og partabrævahugburð. Tað er út frá hesum, at dómsnevndin valdi Vinnuvitan til Ársins Átak.

## KT 2006

Føroyska KT-vinnan endurtók í 2006 sína tvíárligu ráðstevnu. Eins og undanfarnu ár var Norðurlandahúsið karmur um framsýningar, fyrilestrar, kjakfundir og val av ársins talgilding.

KT 2006 var øðrvísi enn undanfarin ár. Færri framsýnarar, minni básar, fleiri fyritøkur um hvønn básin og færri boðskapir vóru eyðkennini fyri framsýningarnar. Eisini fyrilestrarnir vóru øðrvísi, tí fyrireikarnir høvdu valt kreativ heldur enn teknisk evnir.

Føroya Tele fekk heiður fyri at hava ment eina egna skipan til samskipan av øllum virkseminum hjá telefelagnum.

Samanumtikið er føroyska KT-vinnan fyri stórum broytingum. Hóast at KT 2006 tyktist minni enn undanfarin ár, tykist KT-vinnan framvegis at hava nógv at bjóða. Fleiri KT-fyritøkur sum ikki vóru við á KT 2006 vístu á, at tær vóru ov bundnar til aðrar uppgávur, og fleiri fyritøkur vísa á støðuga tørvin á lærdari og dugandi arbeiðsmegi sum eina týðandi avmarking.

## Offshore Faroes 2007

Oljuráðstevnan Offshore Faroes er vorðin eitt árliga afturvendandi tiltak, sum hesuferð varð hildið 17. februar 2007 í Norðurlandahúsinum. Leisturin hesi seinnu árini har eitt serligt evni verður tikið upp seinnapartin, hevur vist seg at vera vælegnaðar og var tí aftur brúktur í 2007.

Fyrri parturin av Offshore Faroes 2007 snúi seg sum vanligt um tað, sum hendir innan oljuleiting á okkara leiðum. Kunnað varð um 3. útbjóðingarumfar og um royndirnar hjá Statoil við boringini 2006. Eisini var kunnað um boringina hjá BP í 2007. Jan Muller hevði harafturat eina áhugarverda gjøgnumgongd av føroyskari oljuvinnu higartil.

Seinnapartin var evni undirveitarar. Føroyskir undirveitarar á altjóða pallinum kunnaðu um sína støðu og royndir. Eisini varð kunnað um royndirnar hjá donskum undirveitarum á alheims marknaðinum. Atlantic Petroleum og Faroe Petroleum góvu ein lýsing av teirra virksemi, sum tað er í løtuni, og hvørjar framtíðar vánirnar eru.

Áðrenn ráðstevnuna sá ikki út til, at undirtøkan var nóg stór, men tá tað til stykkis kom vóru væl omanfyri 100 fólk til staðar í Norðurlandahúsinum. Ráðstevnan var væleydnað, og Oljuvinnufelagið hevur fingið góðar afturmeldingar frá luttakarunum.

Partur

4

# Vinnuhúsið og Føroya Arbeiðsgevarafelag

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur valt, at brúka navnið **Vinnuhúsið** sum felagsnevnara fyri feløgini, sum í dag eru við til at mynda virksemið í húsi okkara.

Føroya Arbeiðsgevarafelag eigur Vinnuhúsið saman við Havnar Arbeiðsgevarafelag og Havnar Handverksmeistarafelag. Tað er tó Arbeiðsgevarafelagið, sum stendur fyri dagliga rakstrinum, meðan hini vinnufeløgini gjalda fyri at vera við í felags umsitingini.

Tað er nevndin í Arbeiðsgevarafelagnum sum leggur linjurnar fyri arbeiðinum í Vinnuhúsinum. Í nevndini sita:

Jóhan Páll Joensen, formaður

Kristoffur Laksá, næstformaður

Bergur Poulsen

Magni Arge

Jón Danielsen

Meinhard Jacobsen

Hákun Djurhuus

Lógir og virðisgrundarlagið hjá felagnum eru lýst á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo.

## Feløgini í Vinnuhúsinum og teirra uppgávur

Í dag eru 16 vinnufeløg undir sama taki: Føroya Arbeiðsgevarafelag (íroknað Havnar Arbeiðsgevarafelag), Føroya Handverksmeistarafelag (íroknað Havnar Handverksmeistarafelag), Føroya Ídnaðarfelag, Arbeiðsgevarafelagið hjá Fíggjarstovnum í Føroyum, Føroya Havbúnaðarfelag, Føroya Ráfiskakeyparafelag, Føroya Keypmannafelag, Føroya Prentsmiðjufelag, Reiðarafelagið fyri Farmaskip, Felagið Laksaskip, KT-felagið, Oljuvinnufelagið, Reklamufelagið og Gistingarhús- og Matstovufelag Føroya.

Feløgini eru sera ymisk í støðd, og tí er eisini stórur munur á virkseminum.

Flestu feløgini eru vinnugreinafeløg ('bransjufeløg') og fáast mest við spurningar, ið eru viðkomandi fyri teirra vinnugrein. Vinnugreinafeløgini arbeiða sjálvstøðugt við sínum málum. Størri mál, sum viðkoma fleiri

vinnugreinum, ella allari vinnuni, verða samskipað av umsitingini í Vinnuhúsinum og Arbeiðsgevarafelagnum.

Sum meginfelag fyri alla arbeiðsgevarasíðuna tekur ***Føroya Arbeiðsgevarafelag*** sær av nógvum ymiskum uppgávum:

1. **Vinnupolitiskir karmar:** Vegna vinnuna verður arbeitt við, at ávirka allar lógir og reglugerðir, sum landsstýri, løgting, umsiting, stovnar og kommunur seta í verk, soleiðis at hesar tæna og ikki darva vinnuni. Vinnufeløgini eru m.a. umboðaði í nógvum ymiskum nevndum, ið seta karmar fyri føroyska samfelagið og framtíð okkara.
2. **Felags sáttmálar fyri vinnuna:** Vegna vinnuna ger Arbeiðsgevarafelagið sáttmálar við løntakarafeløgini, ið tryggja støðug viðurskifti á arbeiðsmarknaðinum og tálma lønarvøkstur í mestan mun.
3. **Kunning:** Arbeiðsgevarafelagið veitir kunning um privatu vinnuna, vinnulig viðurskifti, og tann týdning vinnan hevur fyri samfelagið, bæði beinleiðis og gjøgnum føroyskar miðlar.
4. **Ráðgeving og tænasta:** Felagið veitir limum sínum ráðgeving og tænastur á ymiskum økjum: starvsfólkaviðurskifti og leiðsla, sáttmálar, lógir og reglugerðir á vinnuøkinum v.m. Eisini virkar umsitingin í Vinnuhúsinum sum sambindingarlið við vinnu í øðrum londum.
5. **Fundir og orðaskifti fyri leiðslurnar innan vinnuna:** Felagið hevur átikið sær leiklutin at vera miðdepil fyri vinnuligum og vinnupolitiskum orðaskifti. Skipað verður fyri ymiskum tiltøkum, har bond verða knýtt millum leiðarar í privatu vinnuni - eisini tá húsið er karmur um vitjanir uttaneftir.

## Keldur

Flest øll hagtølini eru úr hagtalsgrunninum hjá Hagstovu Føroya.

Hagtøl viðvíkjandi alivinnuni eru frá Rúna Dam, sp/f Avrik.

Annars eru upplýsingar frá Fíggjarmálaráðnum og peningastovnunum eisini brúktar.